## Skeiðupplýsingar

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** | 2457.20 |
| **ECTS** | 10.00 |
| **Heiti** | Føroysk kirkjusøga í 18. øld |
| **Endamál** | Tann lesandi fær yvirlit yvir føroyska kirkjusøgu og serligt innlit í eitt valt tíðarskeið. |
| **Innihald** | Skeiðið fer at varpa ljós á tær báðar stóru rørslurnar í 18. øld, pietismu og upplýsingartíð, sum trúarrák og politiskar stevnur. Spurt verður, hvørja ávirkan tær fingu á tað kristna, vesturlendskan samfelagið og serliga á trúar- og kirkjulív her á landi.<br>Evni verða eitt nú:<br>-kirkjur: bygningar, roknskapir og guðstænastuskipanir<br>-lesiførleiki, undirvísing og skúlaskapur<br>-prestar og leikfólk<br>-fólkslig trúgv og siðvenja<br>-lesnaður og boðan: lestrabøkur, læribøkur, sálmabøkur<br>Skift verður millum kirkjusøgulig og trúarfrøðilig yvirlit og keldur, sum skulu greinast, tulkast, samanberast og setast inn í mentanarsøguligan og átrúnaðarligan samanhang. |
| **Læru- og undirvísngarhættir** | Undirvíst verður 12 x 3 tímar, lagað eftir kirkjuárinum og arbeiðsbyrðu prestanna. Undirvísingin verður skipað sum fyrilestur, kjak, bólkaarbeiði og framløga frá teimum lesandi. |
| **Próvtøkuháttur** | Skrivlig heimauppgáva |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin |
| **Lestrarlisti** | Grundbók: P. M. Rasmussen: Tættir úr Føroya kirkjusøgu, Tórshavn 1978. (Er tøk sum flokssett)<br>Bókmentalisti og annað tilfar verður tøkt á Moodle |
| **Fortreytir** | Staðið bachelorprógv í gudfrøði. Eisini onnur við hóskandi bachelorprógvi ella samsvarandi útbúgving og arbeiðsroyndum kunnu søkja um upptøku. |
| **Læruúrtøka** | Tey lesandi skulu:<br>• eyðmerkja og skilja ímillum tey stóru rákini í teimum luthersku kirkjunum serliga í 18. øld og meta um tað árin, hesi rák hava havt á føroyskt trúarlív<br>• vísa, at tey eru før fyri at arbeiða sjálvstøðugt við ymiskum átrúnaðarligum tekstasløgum og nýta tey kritiskt sum kirkjusøguligt keldutilfar<br>• lýsa føroyska gudstrúgv við dømum úr frásagnum og átrúnaðarligum skaldskapi<br>• viðgera bæði stríð og samstarv millum kirkjuligar myndugleikar og embæti øðrumegin og tað virkna leikfólkið hinumegin<br>• taka støðu til ta luthersku prædikuna sum livandi orð av prædikustólinum ella endurtøku í lestri og vísa á fyrimunir og vansar við hesum báðum sløgum av boðan<br>• |
| **Stig** | Master |
| **Ábyrgd** | Jákup Reinert Hansen, email: jakuprh@setur.fo |

## Course information

| | |
|---|---|
| **Course number** | 2457.20 |
| **ECTS** | 10.00 |
| **Title** | Faeroese church history in the 18. century |
| **Aim** | Students obtain a general overview of Faroese church history and a deeper insight into a chosen period. |
| **Content** | The course will highlight 18. Century Pietism and Enlightenment as theological as well as political trends, their impact on western Christian society, and their influence on faith and church life in the Faeroes.<br>Topics include:<br>-churches: buildings, budgets, and liturgy<br>-reading skills, school, and education<br>-pastors and lay people<br>-popular life of faith<br>-reading and preaching: homilies, catechisms, hymnals<br>Overviews of church history and dogmatic will alternate with analysis of contemporary sources in comparison with cultural and religious currents. |
| **Learning and teaching approaches** | 12 x 3 lessons, adjusted to the church year and the workload of the pastors. Teaching will take place in lectures, discussions, group work, and presentations by the students. |
| **Assessment method** | Take home assignment |
| **Examination** | External |
| **Grading scale** | 7-step marking scale |
| **Literature** | P. M. Rasmussen: Tættir úr Føroya kirkjusøgu, Tórshavn 1978 (To be handed out)<br><br>Literature will be made available on Moodle. |
| **Prerequisites** | BTh, BA in history or other equivalent preconditions |
| **Learning outcomes** | Having completed the course the students will be able to:<br>• identify and distinguish between the main currents within the Lutheran churches, predominantly in the 18. century, and appreciate their impact on Faroese church life<br>• work on their own with various religious texts and use them critically as sources of church history<br>• describe Faroese life of faith with examples from stories and religious poetry<br>• discuss conflicts and cooperation between authorities, pastors, and lay people debate the Lutheran sermon as preached in the pulpit or repeated in reading and the advantages and disadvantages of these two sorts of preaching |
| **Level** | Master |
| **Contact** | Jákup Reinert Hansen, email: jakuprh@setur.fo |